**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Standard hydrografi. Túrur nr. 1224**
**Tíðarskeið 7-12/6-2012**

---

**Fólk frá Havstovuni:** Hjálmar Hátún og Regin Kristiansen.

**Ábyrgd:** Bogi Hansen

**Endamál:** Endamálið við túrinum var at fylgja við týdningarmiklu heitu og køldu streymunum, ið renna fram við Føroyum. Túrurin var ein partur av teimum regluligu kanningunum eftir standardskurðunum.

**Reiðskapur:** Seabird-CTD við rosettu, WP2-glúpur og átta streymmátarar at seta út.

**Um túrin:** Vit fóru út hósdagin 7/6 kl.1800. Siglt varð norður á støð NWNA, har ein streymmátari í rammu varð settur út. Síðani vórðu streymmátarar settir út á ávikavist NWNB og NWNC. Hesir tríggir streymmátararnir liggja allir á skurði N (sí mynd).
Síðani varð siglt suður á skurð E, sum varð tikin í ein landsynning úr Føroyum. Frá støð E8 sigldu vit suður á NWSX, har vit løgdu eina rammu við streymmátara. Síðani løgdu vit streymmátarar út á ávikavist NWSB, NWSY og NWSC. Hesir fýra streymmátararnir liggja allir á skurði S.
Síðani tóku vit CTD og glúp eftir skurði S.
Tá liðugt var at taka støðir á skurði S, sigldu vit vestur á NWFB, í Bankarennuni, har vit løgdu ein streymmátara út. Haðani varð siglt norður á skurðin vestur úr Mykinesi. Vit byrjaðu á støð M7 og tóku skurðin inn ímóti Mykinesi og endaðu í ein útnyðring á støð R8. Tá liðugt var at taka hesar skurðir, varð siglt inn á Havnina.
Á Havnini tóku vit trolútgerð umborð til at dreggja við.
Vit fóru av Havnini mánadagin 11/6 kl. 09 og sigldu norður á NWNE. Har liggur ein streymmátari í eini rammu, sum ikki kom upp, tá vit tóku allar hinar streymmátararnar upp í mai.
Vit dreggjaðu har allan mánadagin, tó uttan úrslit. Vit góðust at dreggja mánakvøldið, tá tað bleiv myrkt, og sigldu á Havnina
Vit vóru aftur á Havnini týsdagin 12/6 kl. 0600.

**Prøvataking:** Við Seabird CTD-ini tóku vit 40 støðir og salt á 31støðum. Við glúpinum tóku vit 39 støðir.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Saltprøvarnir verða analyseraðir í ár.

**Viðmerkingar:**

13-6-2012 ________________________
Regin Kristiansen


NWNG
NWNB
NWNE
NWNA
st.skurður R
st.skurður M
st.skurður E
NWFB
st.skurður S
NWSX
NWSB
NWSY
NWSC